# GRANNSKOÐANAR- OG BÓKHALDSDAGUR

## 24. NOVEMBER

Vit bjóða tær við hesum til kunningardag fyri grannskoðarar og bókhaldarar. Á degnum upplýsa og vegleiða vit um viðurskifti, sum eru viðkomandi fyri tykkara fak, og vit lata upp fyri viðmerkingum og spurningum.

### 9.00 eRoknskapur og XBRL-fílur

Hvat er status við eRoknskapinum? Hvar eru vit í arbeiðinum at royndarkoyra innlating av XBRL-fílum? Á hvønn hátt takkla vit avbjóðingina at fáa allar fyritøkur at lata inn sambært nýggju krøvunum? Og hvussu fyriheldur Skráseting Føroya seg til krøvini um at lata inn ársfrásagnir sum XBRL-fílur hetta fyrsta árið? *Margreta Dalsgaard, verkætlanarleiðari, Helena D. Højgaard, samskiftisleiðari, Martin Dam, KT-mennari á Elektron, og Ken Nónklett, deildarleiðari hjá Skráseting Føroya, lýsa støðuna og svara spurningum.*

### 10.00 Kaffisteðgur

### 10.20 Nýggir roknskaparleistir

Næsta ár skulu standard roknskaparleistirnir nýtast. Hvørjir eru snávingarsteinarnir, og hvat er umráðandi at vita í hesum sambandi? *Poula á Líðarenda, leiðari á skattadeildini, greiðir frá og vegleiðir.*

### 11.00 Borgaragluggin og talgildar fulltrúir

Talgildingin vinnur fram, og næsta ár letur Borgaragluggin upp fyri talgildum fulltrúum. Hvussu fer hetta at virka, og hvat er umráðandi hjá grannskoðarum og bókhaldarum at vita í hesum sambandi? *Diana Gilstón, leiðari í kundatænastuni, og Ólavur Brimnes, KT-leiðari, siga frá. Ólavur greiðir eisini stutt frá øðrum komandi broytingum í Borgaraglugganum.*

### 12.00 Miðmáli við smyrjibreyði

### 13.00 Vinnugluggin í nýggjum hami

Ein spildurnýggj útgáva av Vinnugluggan um er á gáttini. Hvussu fer hann at síggja út, og hvørjir vera nýggju møguleikarnir? *Margreta Dalsgaard, verkætlanarleiðari, greiðir frá og vísir dømi.*

### 13.45 Mínlykil til Vinnugluggan

Í næstum verður gamli lykilin til Vinnugluggan skiftur út við Mínlykil. Hvussu verður lyklaskiftið gjørt í praksis, og hvørjir vera fyrimunirnir? *Ólavur Brimnes, KT-leiðari, greiðir frá og varpar eisini ljós á framtíðarætlanir við samleika og innritan.*

### 14.00 Kaffisteðgur

### 14.15 Um typufeilir og renturokning og um eftirlitsarbeiðið hjá TAKS

Hvørjir eru vanligastu typufeilirnir í vinnubólkum? Hvat er røtt renturokning av millumrokningum? Og hvussu skipa vit eftirlitsarbeiðið hjá TAKS? *Poula á Líðarenda, deildarleiðari á skattadeildini, greiðir frá og svarar spurningum.*

### 15.00 Takk fyri í dag

**Umráðandi praktisk kunning**

Vit vera í nýggju høllini hjá Starvsmannafelagnum í **J. H. Schrøters gøtu 7 í Havn**.
Tað er ókeypis at luttaka, men vit vilja fegin vita, hvussu nógv, ið koma.
Maila okkum boð um luttøku til Lisbeth Johanneson á lj@taks.fo í seinasta lagi mánadagin, 21. november.

**Vælkomin.**